Vit kenna øll politisku stereotypurnar: Høgrasinnað ganga inn fyri einum avmarkaðum vælferðarstati, siðbundnum familjuvirðum, avmarkaðari immigratión, trygd og harðari revsing fyri brotsverk. Og tey lesa nógv heldur eina biografi um Mærsk McKinney Møller, enn nýggjasta samfelagskritikkin av meginlandinum. Vinstrahall rópa um sosialar kollveltingar, rættvíst býti av búskaparligum ágóðum, mannarættindi og kanska enntá djórarættindi. Alt hetta skurrar eitt sindur í oyrunum hjá teimum høgrasinnaðu

Spurt varð í einari kanning í fleiri londum, hvørt fólk heldur vildi hava ein hund, ið var loyalur, og ikki ov skjótur at gerast vinur við fremmand, ella ein hund, ið var opin ímóti fremmandum, og sum sá eigaran sum ein javnbjóðis vin. Úrslitið vísti greitt, at tey, ið mettu seg meiri høgrasinnað, heldur vildu hava hundin við sterkum loyalitetseyðkennum. Tey vinstrahallu vildu hava hundin, ið var teirra javnbjóðis vinur.